

KRINGVARP FØROYA

# Ársfrágreiðing

2024

# Kringvarpið
# – pallurin, har allir føroyingar hittast

Vit taka tey mál upp, sum hava týdning fyri teg. Tí eru vit fremsti mentanarberi føroyinga. Endamálið hjá Kringvarpi Føroya er at veita eina public service-tænastu, sum savnar, undirheldur og ríkar.

# Innihald


| | |
|---|---|
| Formæli | 4 |
| Framleiðsla | 6 |
| Álit og nýtsla | 10 |
| Aktuelt | 21 |
| Ítróttur | 25 |
| Mentan | 29 |
| Átrúnaður | 35 |
| Børn og ungdómur | 38 |
| Tónleikur | 44 |
| Public service | 48 |






**Kringvarp Føroya**
**Ársfrágreiðing 2024**

Forsíðumynd
Bjarni Árting Rubeksen

Myndir
Bjarni Árting Rubeksen
og egnar myndir

Uppseting
Guðrið Syderbø

# Formæli

## Hondbóltur, kommunuval, verkfall og ein nýggjur public service-sáttmáli galdandi í fýra ár settu dám á enn eitt hendingaríkt ár í Kringvarpi Føroya. Public service-sáttmálin stílar høgt, og ein strategi er stungin út í kortið fyri at røkka teimum settu málunum.

Árið var ikki meira enn byrjað, tá ið føroyingar í túsundatali tustu til Berlin, har landsliðið hjá monnum í hondbólti skuldi luttaka í einum evropeiskum endaspæli fyri fyrstu ferð. Kringvarpið var við á ferðini, og í Føroyum vóru gøturnar manntómar, tá ið Kringvarpið leygarkvøldið 18. januar vísti og segði frá dystinum millum Føroyar og Noreg, sum endaði 26-26 og við fyrsta føroyska stiginum nakrantíð í skjáttuni. Ein kanning seinni vísti, at heili 88,6 prosent av føroyingum hugdu at spennandi dystinum.

1. desember gjørdu føroysku hondbóltskvinnurnar monnunum bragdið eftir í Basel í Sveis, tá tær í síni fyrstu EM-luttøku megnaðu at spæla javnt 17-17 móti Kroatia og sostatt eisini tryggjaðu sær sítt fyrsta stig í einum endaspæli.

Hondbólturin fylti nógv í fjør í Kringvarpinum, og annar ítróttur – eitt nú OL-luttøkan hjá føroysku rógvarunum Sverra Sandberg Nielsen og Sáru Mariu Johansen – fekk eisini stóra rúmd bæði í sjónvarpi og útvarpi og á heimasíðuni hjá Kringvarpinum.

Hetta fer neyvan at broytast stórvegis í 2025, har vit millum annað kunnu gleða okkum til at síggja kvinnulandsliðið í hondbólti í kapping í HM-endaspælinum, sum verður í Týsklandi og Hollandi í vetur.

Ítrótturin, sum Kringvarpið framleiðir og sendir frá, savnar tjóðina, og júst hetta at vera við til at tryggja savningarmegina í føroyska samfelagnum er eitt av aðalmálunum hjá Kringvarpi Føroya sum public service-miðil.

Nýggjur public service-sáttmáli varð loksins undirskrivaður millum Almanna- og Mentamálaráðið í fjør. Tann fyrsti, síðani sáttmálin frá 2017-2020 gekk út.

Sáttmálin stingur út í kortið kósina hjá Kringvarpinum fram til 2028, og ein av høvuðsyvirskriftunum í sáttmálanum er, at "Kringvarpið skal verja fólkaræði og mentan". Útlendsk miðlatilboð seta føroyska miðlalandslagið undir trýst, og tilvísingarnar til føroyska mentan og samleika fækkast. "Alt hetta setur upp aftur størri krøv enn áður til leiklutin hjá Kringvarpið Føroya sum ein savnandi miðil í føroyska samfelagnum. Fremsta endamálið hjá Kringvarpi Føroya er at savna felagsskapin, at verja borgaran og at avdúka møguligar váðar og vandar, sum kunnu hótta mentanina, fólkaræðið og vælferðina í landinum", stendur í sáttmalanum.

Eitt av aðalmálunum, ið sett verður í sáttmálanum, er, at Kringvarpið skal røkka 4 av 5 føroyingum hvønn dag, annaðhvørt á pallinum sjónvarp, útvarp ella heimasíðu. Fyri at røkka hesum máli skulu átøk

"Eitt av aðalmálunum, ið sett verður í sáttmálanum, er, at Kringvarpið skal røkka 4 av 5 føroyingum hvønn dag, annaðhvørt á pallinum sjónvarp, útvarp ella heimasíðu. Fyri at røkka hesum máli skulu átøk fremjast ..."

Magnus Dam,
kringvarpsstjóri



“Heimasíðan kvf.fo varð latin í nýggjan ham í fjør við greiðum samleika við tíðindasíðuni fremst og møguleikanum at velja ‘Ljóð’ og ‘Sjón’, har loftvarpaðu sendingarnar liggja.”

fremjast serliga á trimum økjum: (1) Tøkniliga infrakervið skal styrkjast, (2) framleiðsluætlanir skulu tillagast fyri deildirnar Aktuelt og Mentan og (3) starvsfólka- og førleikaætlanir skulu setast í verk og skipast frameftir.

Arbeiðið og átøkini at røkka aðalmálinum eru farin í gongd, og komið var nærum á mál við strategiini hesum viðvíkjandi í 2024. Í ár verður seinasta hond løgd á strategiina, ið umframt tey trý omanfyrinevndu átøkini eisini leggur dent á hugtakið “outreach”. Hetta er sambandið við samfelagið, sum skal styrkjast, við, at Kringvarpið skal kunna meira og vera meira opið um sítt virksemi og lata dyrnar upp bæði í yvirførdum týdningi og bókstaviliga í sambandi við tiltøk sum mentanarnáttin og knýta tættari samband við skúlar og útbúgvingarstovnar.

Á framleiðslusíðuni gjørdi Kringvarpið nógv burtur úr kommunuvalinum í november. Ein stór kanning varð gjørd um tey viðurskiftini, ið borgarar í øllum kommunum í landinum mettu hava týdning fyri sín gerandisdag. 3.000 fólk vórðu spurd, hvat tey halda um stýrið, um tænasturnar og um liviligheitina í kommununi. Innsløg vórðu send í sjónvarpi og útvarpi úr øllum kommunum í landinum, og úrslitini frá kanningini vórðu greinað og viðgjørd í tíðindasendingum, kjaksendingum og á kvf.fo.

Heimasíðan kvf.fo varð latin í nýggjan ham í fjør við greiðum samleika við tíðindasíðuni fremst og møguleikanum at velja “Ljóð” og “Sjón”, har loftvarpaðu sendingarnar liggja. Í árinum vórðu fleiri væleydnaðar royndir gjørdar at brúka heimasíðuna sum fremsta tíðindamiðil at lýsa serstakar hendingar, eitt nú illveðursódnina í januar og verkfallið hjá arbeiðarafeløgunum í mai.

Á mentanarøkinum varð sjóneykan sett á tey mongu lesandi, sum flyta til Danmarkar at lesa og ikki koma aftur eftir loknan lesnað. Sendirøðin “Kanst tú siga farvæl” lýsti evnið, sum eisini varð viðgjørt í tíðindahøpi og í einum serskøktum poddi, sum fór aftur um tølini. Sigast kann, at sendingin setti dagsskránna og elvdi til stórt kjak í samfelagnum.

Í tveimum pørtum varð søgan um orkestrið Straight Ahead lýst í sendirøðini “Komið øll við”. “Heim, kæra heim” var nýggj sending, sum vitjaði í húsum kring landið, sum á ymiskan hátt eru áhugaverd. Ein onnur væl umtókt sendirøð var “Sært tú fuglin” um mongu ymisku fuglasløgini, sum eru at síggja í Føroyum.

Kringvarpið hevur altíð stuðlað undir føroyska tónleikapallin, og vit kunnu fegnast um, at 64 % av tónleikinum, sum varð spældur í útvarpinum í 2024, var føroyskur. Prosentparturin av føroyskum tónleiki í útvarpinum hevur verið støðugt vaksandi undanfarnu árini.

Á útvarpssíðuni hoyrdu vit eisini fleiri forvitnisligar ungdómssendingar, eitt nú “Súrligar nætur” og “Sex Partar”, ið snúgva seg um viðurskifti, ið fylla í huganum hjá teimum ungu.

Á barnaøkinum fór eitt nýbrot fram, tá ið Kringvarpið fyri fyrstu ferð nakrantíð kundi vísa ein barna- og familjuteknifilm í biografinum við føroyskari talu. Talan var um filmin um kendu músina Klintrimús og hini djórini í Vallbakkaskógini. Hetta tiltak eydnaðist so mikið væl, at ætlanin er at endurtaka royndina við einum øðrum føroyskaðum filmi í oktober í 2025. Vónin er, at tað aftur skal eydnast at fylla Havnar Bio við børnum og barnafamiljum, ið kunnu njóta film við føroyskari talu í heystfrítíðini.

Við slíkum væleydnaðum verkætlanum gevur Kringvarpið útlendsku miðlapallunum kapping og birtir undir málmenningina hjá føroyskum børnum, ið er enn eitt av aðalmálunum hjá Kringvarpinum.

Á fíggjarliga økinum viðgjørdi Løgtingið í fjør uppskot um tillagingar í kringvarpsgjaldinum. Eftir at hava staðið í stað í nógv ár, varð gjaldið hjá privatpersónum hækkað nakað, og fyri smærri virki og stovnar minkaði gjaldið nakað. Samstundis varð samtykt, at gjaldið hjá likamligum persónum veksur við tveimum prosentum um árið. Hetta gav Kringvarpinum eitt betri fíggjarligt grundarlag at standa á enn frammanundan, men lønarvøkstur og vanligur prísvøkstur bjóða langtíðarhaldførinum hjá Kringvarpinum av, og hetta er ein avbjóðing, ið leiðslan arbeiðir støðugt við.

Vónin er, at hesar avbjóðingar í so lítlan mun sum gjørligt skulu ávirka útboðið av sendingum og tilboðið til føroyska brúkaran.

Við ynskjum um eitt gott Kringvarpsár við dygdargóðum, føroyskum tilfari til alt Føroya fólk.

Magnus Dam, kringvarpsstjóri

# Framleiðsla



# Framleiðsluyvirlit

Yvirlitið vísir egna framleiðslu í Kringvarpinum.
Bólkarnir fevna um hesar sendingar:

### Aktuelt
Útvarpstíðindi, Dagur og vika, tíðindafundir, stuttdokumentarar og Breddin.

### Tónleikasendingar
Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

### Infotainment
Orðið er heiti fyri sendingar, ið kunnu bólkast sum bæði “information” og “entertainment”. Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Góðan Morgun Føroyar, Vikuskiftið, Ólavsøkuprát, Gekkurin, Summargestir o.l.

### Børn og ung
Barnaútvarpið, barnasendingar í sjónvarpinum, ungdómssendingar – eitt nú Kvøldvaktin og aðrar sendingar, sum ung framleiða.

### Átrúnaður
Morgunlestrar, andaktir, gudstænastur, møti og sendingarnar Kallið og Skrivað stendur.

### Mentan
Mentanarsendingar, Vikan, siðsøga (t.d. Meg minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórði á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

### Ítróttur
Ítróttasendingin í útvarpinum um vikuskiftið, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fótbólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

### Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingarnar
Tingvarpið í sjónvarpinum.

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tímar tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 675 | 111 | 786 |
| Tónleikasendingar | 5.202 | 31 | 5.233 |
| Infotainment | 988 | 34 | 1.022 |
| Børn/ung | 231 | 141 | 372 |
| Átrúnaður | 260 | 70 | 330 |
| Mentan | 1.234 | 129 | 1.363 |
| Ítróttur | 193 | 97 | 290 |
| **Samanlagt** | **8.783** | **613** | **9.396** |

Yvirlitið vísir einans føroyska framleiðslu

## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til útvarpið



## Yvirlit yvir føroyskt framleitt tilfar til sjónvarpið



# Álit og nýtsla



# Álit og nýtsla

Síðani februar 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað ávikavist álit føroyinga á Kringvarpinum og nýtsluna av pallum Kringvarpsins. Álit er ein av fortreytunum fyri tilverurættinum hjá Kringvarpinum, og hesum arbeiðir stovnurin miðvíst við at varðveita og betra.

500 fólk í aldrinum 18-80 ár í øllum landinum verða regluliga biðin um at meta um, hvussu stórt álit tey hava á føroyskum tíðindamiðlum sum heild og á Kringvarpinum. Harumframt er eitt av strategisku málunum hjá Kringvarpinum at røkka 80 % av føroyingum hvønn dag. Tí verða hyggjara- og lurtaratøl somuleiðis javnan kannað.

Tílíkar spurnakanningar skulu takast við ávísum fyrivarni, men tær geva góðar ábendingar.

Talvurnar vísa ávikavist álitið á Kringvarpinum og nýtsluna av Kringvarpinum í august 2024:

## Hvussu stórt álit hevur tú á upplýsingum, sum koma frá Kringvarpi Føroya / kvf.fo?



## Hvussu ofta brúkar tú Kringvarp Føroya / kvf.fo? (august 2024)



# Hyggjara- og lurtaratøl

Spyr.fo kannar hyggjara- og lurtaratøl fyri Kringvarpið nakrar ferðir um árið.

Kanningarnar vísa, at bæði útvarps- og sjónvarpssendingar hjá KVF eru væl umtóktar. 500 svargevar verða javnan spurdir, hvørjum teir hava lurtað ella hugt at dagin fyri.

Tølini fyri einstøku sendingarnar eru góð. Eitt nú lurtaðu 45,4 % eftir útvarpstíðindunum kl. 12.20 mánadagin 8. januar, og 45,2 % lurtaðu kl. 18 sama dag.

Heili 61 % hugdu at Degi og viku 8. januar; 49 % hugdu beinleiðis, 8,6 % hugdu á netinum, aftan á sendingin varð send, og 3,4 % hugdu at endursendingini.

Tað eru tó ikki bara tíðindi og aktualitetur, sum upptaka uppmerksemið hjá føroyingum. Góðan morgun Føroyar, sum er ein blandingur av undirhaldi og upplýsing, hevur eisini góð lurtaratøl. Mikumorgunin 6. mars lurtaðu 42,2 % av føroyingum eftir Góðan morgun Føroyar. Sendingin tykist hava trúfastar lurtarar, tí tølini frá lurtarakanningum, ið áður eru gjørdar, hava víst á leið sama úrslit.

Tølini benda á, at sendingar, sum eru á skrá rundan um útvarpstíðindini og Dag og viku, hava hægstu tølini.

## Hugdi tú at Degi & viku 8. januar 2024?



## Hvørjum tíðindasendingum lurtaði tú eftir í KVF í dag, 8. januar?



## Hvørjum tíðindasendingum lurtaði tú eftir í KVF í dag, 27. august?




Hvørjar eru tínar høvuðskeldur til tíðindi í gerandisdegnum? (januar 2024)
70 %
60 %
50 %
40 %
30 %
20 %
10 %
0 %
Føroyskir tíðindaportalar
Útvarpið hjá KVF
Sjónvarpið hjá KVF
Útlendskir tíðindaportalar
Facebook
Útlendskar kringvarpssíður
Aðrar føroyskar útvarpsrásir
Føroysk bløð
Youtube
Annað
TikTok
Tíðindi hava ikki mín áhuga

## Hvørjum av hesum sendingum hevur tú lurtað eftir? (januar 2024)



## Hvørjum av hesum sendingum lurtaði tú eftir í KVF? (mars 2024)



# Talgildir miðlar

Á pallum Kringvarpsins er ein ørgrynna av kunnandi, mennandi og undirhaldandi tilfari. Sosialu miðlarnir eru ein sýnisgluggi inn í henda fjølbroytta heim. Við sosialu miðlunum eru vit til staðar, har fólkið er, og vit kunnu minna tey á, hvat Kringvarpið bjóðar. Í flestu førum verða fólk á sosialum miðlum beind inn á kvf.fo, har alt sjónvarps- og útvarpstilfar er tøkt.

Eyðsýnt er, at fólk í Føroyum hava størstan áhuga fyri tilfari innan fyri evnini:

- Persónssøgur
- Politikkur
- Ymisk brøgd – eitt nú ítróttalig, tónleikalig og listalig
- Vanlukkur/kriminalitetur
- “Skeivar” søgur
- Myndafrásagnir
- Kendir føroyingar
- Umstrídd evni

# Lyklatøl frá kvf.fo

- 663.000 ymsir brúkarar ella eindir vitjaðu *forsíðuna* á kvf.fo í 2024
- 7,1 millión klikk á *KVF Ljóð*
- 2,5 milliónir klikk á *KVF Sjón*
- 7.407 klikk í miðal á *andlát* hvønn dag
- 78 % av vitjanunum á heimasíðuni vóru um fartelefon ella teldil

**Flestu fólk, sum vitjaðu kvf.fo í 2024, vóru í**

| | |
|---|---|
| Føroyum | 75,78 % |
| Danmark | 14,9 % |
| Norra | 2,95 % |
| Íslandi | 2,06 % |
| USA | 1,92 % |



## 10 tær mest lisnu greinarnar á kvf.fo

1. Fylg við beinleiðis: Ódnarveður
2. Naddoddur holvdur: Fimm persónar bjargaðir, men ein er druknaður
3. Ólekiliga sjúkur við krabbameini: "Tá man er farin, so er man farin"
4. Atkvøðugreiðsla: Her eru teir 10 finalistarnir til ársins útvarpshitt 2023
5. Flogskipari: Máttu bíða til Kambur sakk at fáa fatur á síðsta manninum
6. Atkvøðugreiðsla: Hvat var ársins útvarpshitt?
7. Livar bíðar eftir at verða avhoyrdur
8. Harður retorikkur eftir úrslitaleysa semingsroynd
9. Verkfallið er av
10. Støðudagføring: Kambur er sokkin, og tveir menn eru enn saknaðir

## Lyklatøl frá Instagram og Facebook

517.200 fólk hava sæð okkara tilfar á *Facebook* í 2024. Hetta er framgongd á 177,8 % samanborið við tíðarskeiðið 31. desember 2022-31. desember 2023.

Á *Instagram* vóru 57.400 fólk, ið hava sæð okkara tilfar í 2024. Hetta er framgongd á 62,5 % samanborið við tíðarskeiðið 31. desember 2022-31. desember 2023.



Væl dámd uppsløg á sosialum miðlum

# Aktuelt



# Aktuelt

Stormur, verkfall og kommunuval vóru nakrar av hendingunum, sum myndaðu tíðindaárið 2024. Ikki bara í yvirskriftum, men eisini í mátanum, vit arbeiddu sum tíðindamiðil.

Seinasta dagin í januar, ein mikudag, fingu vit eina veruliga vetraródn. Í Kringvarpinum varð, beinanvegin greitt var, hvussu ring veðurlíkindini fóru at vera, gjørt av at lata ódnina eiga dagsskránna og at lata tíðindaleiðaran yvirtaka leiðsluna á sendingunum, so leingi stormurin kravdi tað.

Tíðliga um morgunin brast á. Góðan morgun Føroyar-manningin og tíðindadeildin arbeiddu saman um "stormvarpið" allan buldraliga fyrrapartin og rapporteraðu frá bjargingarliðunum og løgregluni kring landið.

Heimasíðutoymið bað fólk um at senda inn video og myndir, og veðurmaðurin Andrias Gregoriussen settist við telduna at svara spurningum frá fólki beinleiðis, í livebloggi. Seinnapartin hasaði av, og vit kundu fara undir at greiða frá upptakinum eftir teir mongu skaðarnar, sum tíbetur ikki umfataðu fólkaskaða.

Fyri Aktuelt-deildina var ódnardagurin øðrvísi enn aðrar ódnir í valinum av miðlum. Vit sendu onga eyka sjónvarpssending, men løgdu dent á teir miðlarnar, sum kundu fylgja støðuni frá minutti til minutt. Heimasíðan var berandi myndamiðil okkara henda dagin og stóð seg væl. Formurin «livebloggur» kom veruliga til sín rætt við teksti, myndum og video, umframt veðurfrøðingin.



Stóra arbeiðið at geva kvf.fo nýggjan ham kom fyri eyguni og oyruni á brúkaranum í mars. Nýggi, greiði samleikin hjá heimasíðuni hevur tíðindasíðuna fremst og síðani møguleika at velja "Ljóð" og "Sjón", har loftvarpaðu sendingarnar liggja. Brúkaratølini benda á, at heimasíðan verður nógv brúkt bæði til at lesa tíðindini og í staðin fyri út- og sjónvarpstól til at lurta og hyggja beinleiðis ella tá tað liggur fyri hjá tí einstaka.

Í mai var aftur eitt gott høvi at nýta allar pallar okkara í góðum samstarvi. Sáttmálasamráðingarnar millum arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløgini endaðu við verkfalli, sum sjálvandi merkti alt landið og harvið eisini tíðindini. Tørvur var á at fylgja við tíðliga og seint, og serliga myndatilfar var týdningarmikið fyri at dokumentera blokadur, hamstring og onnur verkfalsfyribrigdi. Myndatilfarið varð sjálvandi nýtt í Degi og viku, men eisini í stóran mun lagt á heimasíðu, savnað í eitt verkfalstema, og á sosialu miðlar okkara, so tíðindini komu út so fesk sum gjørligt. Verkfallið gjørdist tískil eisini eitt høvi at venja okkum at gera video beinleiðis til sosialar miðlar, sum er nakað øðrvísi enn at taka upp til sjónvarp.

**663.000** ymsir brúkarar ella eindir vitjaðu forsíðuna á kvf.fo í 2024

**7,1 millión** klikk á KVF Ljóð

**2,5 milliónir** klikk á KVF Sjón



## Kommunuvalið – størsta kommunukanning nakrantíð

Fyrireikingarnar til kommunuvalið fóru í gongd um várið. Vit settu okkum fyri, at til hetta valið skuldi okkara dekningur hava eitt betri faktagrundarlag enn til onnur kommunuval. Vit gjørdu tí av at gera eina stóra kanning, har vit spurdu fólkið í hvørjari kommunu sær, hvat tey halda um stýrið, um tænasturnar og um liviligheitina, har tey búgva. Kanningarfyritøkan Lóður átók sær at gera kanningina, har fleiri enn 3.000 fólk vórðu spurd. Úrslitini vórðu sett upp á serstakari undirsíðu á kvf.fo.

Umframt kanningina varð mál sett um at vitja allar kommunur og gera innsløg til út- og sjónvarp haðani. Hetta eydnaðist. Seinasta vitjanin var sjálvan valdagin.

Við kanningarúrslitunum bar til at staðfesta mangt, sum ongin hevði staðfest áður, tí ongin slík stór, samanberandi kanning av øllum kommunum er gjørd áður. Úr rúgvuni kann nevnast:

— Nes kommuna, Eysturkommuna og Sumbiar kommuna hava eitt gott umdømi millum onnur, halda fólk har.

— Fólk á Tvøroyri eru sera nøgd við tilboðini til børn og ung.

— Tilboðini til eldri eru góð, halda tey á Eiði.

— Nes kommuna fekk bestu skoðsmál av øllum kommununum frá borgarum sínum.

— Fólk í Klaksvík vilja hava kommununa at raðfesta vegir og viðlíkahald og brúka minni til ítrótt.

— Í Sunda kommunu vilja fólk hava betri ferðslutrygd.

— Í Sands kommunu vóru fólk minst nøgd við samskiftið millum borgarar og kommunu.

Tá valdagurin nærkaðist, gjørdu vit tríggjar kjaksendingar í sjónvarpi, bygdar á úrslit úr kanningini. Og til sjálvt valkvøldið sendu vit beinleiðis sjónvarp úr 5 studioum kring landið, umframt at vit høvdu koyrandi reportaralið, sum fangaðu støður ymsastaðni.

Aktuelt-deildin fekk nýggjar journalistar í august 2024, men av ymsum orsøkum mátti aftur søkjast eftir avloysarum og einum føstum starvsfólki um heystið. Allarseinast í árinum luttóku vit á JobMatch í Norðurlandahúsinum og gjørdu harumframt eitt videobrot, har starvið sum journalistur varð lýst. Hetta gav gott úrslit, og beint eftir árslok var greitt, at vit høvdu fingið 23 umsóknir til størvini.

Miðað verður eftir at førleikamenna starvsfólkini á Aktuelt miðvíst, bæði við innanhýsis skeiðum og við at senda fólk á skeið aðrastaðni. Í 2024 varð dentur lagdur á samrøðu-teknikk, á løgfrøði í sambandi við tíðindaflutning frá rættarmálum og á vaksandi nøgdirnar av ivasamari og skeivari information í altjóða høpi. Fýra av skeiðsluttøkunum vóru gjøgnum Nordisk Journalistcenter, sum er ein sera góður samstarvspartur fyri ein lítlan public service-miðil sum okkara.

“Vit hoyra ofta bara um mál frá borgarstjórum og av og á frá andstøðuni, men í ov lítlan mun frá teimum, ið gjalda: Borgarunum í kommununi. Hetta er ein roynd at bøta upp á hetta holið í kunnleikanum hjá miðlum og hjá okkum øllum.” Katrin Petersen, tíðindaleiðari.

## Útgávuætlanir og samstarv ímillum deildir

Í november gjørdi Mentanardeildin sjónvarps-dokumentarrøðina «Kanst tú siga farvæl?», sum snúði seg um stóru fráflytingina úr Føroyum og minnu heimafturflytingina. Útgávuætlan varð gjørd, sum segði, hvussu tilfarið úr sendingunum skuldi nýtast, og hvørjar aðrar greinar og sendingar skuldu gerast afturat. Allir pallar vórðu nýttir, og útgávu-ætlanin eydnaðist sum eitt gott samstarv millum deildir og við, at Kringvarpið setti dagsskránna. Á Aktuelt komu bæði greinar, innsløg og Bredda-sendingar burtur úr samstarvinum.

## Tær tungu sendingarnar

Í august fór Kringvarpið til Aalborg at fylgja við ríkisfundinum, ið har varð hildin. Um kvøldið eftir fundin komu syrgiligu boðini um, at opni báturin Naddoddur, ið var farin á slóð víkinganna til Noregs, hevði fingið ein sjógv og varð farin runt. Hetta var onnur vanlukkan á havinum í 2024. Sætta februar fórust tveir menn við línuskipinum Kambi sunnan fyri Suðuroynna, meðan tað eydnaðist tyrluni hjá Atlantsflogi at bjarga hinum 14. Slíkar vanlukkur eru nívandi fyri tey avvarðandi, og fyri fjølmiðlar er trupla uppgávan at veita neyv og skjót tíðindi um tilburðir-nar og samstundis verja tey, ið liva í vónini, ímóti at fáa svár boð ella eymar upplýsingar umvegis miðlar-nar. Í slíkum støðum gera vit okkum eyka ómak at fáa upplýsingar váttaðar frá røttu keldunum.

Tá Naddoddur fórst, og vit høvdu fólk á ferð, tóku vit eina skjóta avgerð og sendu John Johannessen og Gest Lómstein til Florø í Noregi, har tey, ið bjargað vórðu, komu í land. Ein av manningini var ikki komin afturíaftur á lívi.

At vit vóru á staðnum og komu at fylgjast heim við Livari Nysted, gav okkum høvi seinni at gera sendingina "Brotið", har Livar greiðir frá hendingini og gevur innlit í sína uppliving við orðum og gjøgn-um málningar og myndir sínar. Sendingin varð send um jólini.







# Ítróttur



# Berlin og Basel: Søguligt ár í føroyskum ítrótti




2024 var eitt av teimum størstu í føroyskari ítróttasøgu. Bæði hondbóltsmenninir og hondbóltskvinnurnar spældu millum tey bestu í EM-endaspølunum í Berlin og Basel, og føroyingar bæði úti og heima kundu fegnast saman við hondbóltsstjørnum sum Eliasi Ellefsen á Skipagøtu, Janu Mittún, Hákuni West av Teigum og Pernille Brandenborg, tá fyrstu stigini komu til høldar. Kringvarpið spenti seg út og fegnast um at sleppa at varpa hesar og komandi stórhendingar út á føroysku skíggjarnar.

Ikki færri enn tveir føroyingar róðu á Olympisku leikunum í París á sumri í 2024. Kendi miðvingurin Sverri Sandberg Nielsen setti seg aftur í einskullaran eftir vónbrotið í Tokyo, meðan Sára Maria Johansen gjørdist olympisk sum partur av danska “áttaranum”. Teirra søgu fortaldi Kringvarpið eisini, í hesum føri mest á heimasíðuni, og hóast tað ikki eydnaðist teimum at røkka finaluplássum, var spennandi at fylgja hvørjum taki.

Kringvarpið fekk eisini ta gleði aftur at framleiða heimadystirnar hjá fótbóltslandsliðnum við kvinnum, sum stóð seg væl og fekk níggju stig í EM-undankappingini ímóti Grikkalandi, Montenegro og Andorra.

## Hvørjar EM hondbóltsdystir hjá Føroyum sást tú?



# 2024 í tølum

Yvirlitið vísir ítróttin, sum Kringvarpið hevur sent beinleiðis í sjónvarpinum ella á kvf.fo í 2024. Afturat hesum er útvarpsítróttur sum til dømis beinleiðis fótbóltur, Fótbóltsprát og so sjálvandi 3-2, sum verður send á leið 40 ferðir um árið. Tvey hondbóltsendaspøl vóru í 2024, og millum annað tí er talið av beinleiðis ítróttahendingum størri enn nakrantíð fyrr.

**JANUAR**

- 5. Hondbóltur, menn / Føroyar - Belgia (fyrri venjingardystur) / SV
- 6. Hondbóltur, menn / Føroyar - Belgia (seinni venjingardystur) / SV
- 11. Hondbóltur, menn / Føroyar - Slovenia (EM-dystur) / SV
- 13. Hondbóltur, menn / Føroyar - Norra (EM-dystur) / SV
- 15. Hondbóltur, menn / Føroyar - Pólland (EM-dystur) / SV
- 27. Fimleikur / estetiskur, 1. steypak. / KVF.FO

**FEBRUAR**

- 10. og 11. Hondbóltur / hálvfinalur í steypakappingini x 4 / KVF.FO
- 17. Hondbóltur / finalur í steypakappingini x 2 / SV
- 28. Hondbóltur, kvinnur / Luksemborg - Føroyar / SV

**MARS**

- 3. Hondbóltur, kvinnur / Føroyar - Luksemborg / SV
- 9.. Fimleikur / estetiskur, 2. steypak. / KVF.FO
- 22. Fótbóltur, menn / Liktinstein - Føroyar / SV
- 23. og 24. Dart / Tórshavn Open og Faroe Islands Open / KVF.FO
- 26. Fótbóltur, menn / Danmark - Føroyar / SV

**APRÍL**

- 3. Hondbóltur, kvinnur / Føroyar - Svøríki / SV
- 5. Fótbóltur, kvinnur / Grikkaland - Føroyar / KVF.FO
- 6. Judo, borðtennis og badminton / Stóri FM-dagurin / SV
- 7. Hondbóltur, kvinnur / Ísland - Føroyar / SV
- 9. Fótbóltur, kvinnur / Montenegro - Føroyar / SV
- 18. Hondbóltur, kvinnur / EM-lutakast / SV

**MAI**

- 8. Hondbóltur, menn / Føroyar - Norðurmak / SV
- 12. Hondbóltur, menn / Norðurmak - Føroyar / SV
- 12. Fimleikur / FM í estetiskum fimleiki
- 31. Fótbóltur, kvinnur / Føroyar - Andorra / SV

**JUNI**

- 1. Kappróður / FM á norðoyastevnu / SV
- 4. Fótbóltur, kvinnur / Føroyar - Grikkaland / SV
- 8. Fótbóltur, menn / Estland - Føroyar / SV
- 11. Fótbóltur, menn / Lettland - Føroyar / SV
- 15. Kappróður / FM á sundalagsstevnu / SV
- 22. Kappróður / FM á jóansøku / SV
- 29. Kappróður / FM á fjarðastevnu / SV

**JULI**

- 6. Kappróður / FM á eystanstevnu / SV
- 11. Fótbóltur, menn / KÍ - Differdange / SV
- 12. Fótbóltur, kvinnur / Føroyar - Montenegro / SV
- 13. Kappróður / FM á vestanstevnu / SV
- 16. Fótbóltur, kvinnur / Andorra - Føroyar / KVF.FO
- 18. Fótbóltur, menn / Víkingur - Leipaja / KVF.FO
- 28. Kappróður / FM á ólavsøku / SV
- 30. Fótbóltur, menn / KÍ - Malmø / KVF.FO

**AUGUST**

- 1. Fótbóltur, menn / Víkingur - Gent / SV
- 8. Fótbóltur, menn / KÍ - FC Borac / SV
- 22. Fótbóltur, menn / KÍ - HJK Helsinki / KVF.FO

**SEPTEMBER**

- 7. Fótbóltur, menn / Føroyar - Norðurmak / SV
- 10. Fótbóltur, menn / Lettland - Føroyar / SV

**OKTOBER**

- 10. Fótbóltur, menn / Føroyar - Armenia / SV
- 13. Fótbóltur, menn / Føroyar - Lettland / SV
- 19. og 20. NM í vektlyfting / KVF.FO

**NOVEMBER**

- 7. Hondbóltur, menn / Føroyar - Kosovo / SV
- 10. Hondbóltur, menn / Ukraina - Føroyar / SV
- 14. Fótbóltur, menn / Armenia – FO / SV
- 17. Fótbóltur, menn / Norðurmak - FO / SV
- 29. Hondbóltur, kvinnur / Føroyar - Sveis (EM-dystur) / SV

**DESEMBER**

- 1. Hondbóltur, kvinnur / Føroyar - Kroatia (EM-dystur) / SV
- 3. Hondbóltur, kvinnur / Føroyar - Danmarl (EM-dystur) / SV
- 13. Fótbóltur, menn / Lutakast / SV

# Mentan



# Føroyskar røddir, livandi søgur

Starvsfólk og fríyrkisfólk á Mentanardeildini í Kringvarpinum hava aftur í ár lagt seg eftir at varpa ljós á samfelag, menniskju og mentan gjøgnum fjølbroyttar dokumentarsendingar og røðir. Søgur eru sagdar úr veruleikanum, sum bæði spegla lívið í Føroyum og tað, sum rørir seg uttanlands.
Niðanfyri kanst tú lesa um nakrar av teimum mongu sendingunum, sum vóru framleiddar og sendar í 2024 – frá stórum samfelagsspurningum og innlitum í list og lív, til persónligar upplivingar og smá brot úr gerandisdegnum.



## Sjónvarp

### Røðir

**Kanst tú siga farvæl?**

Sendirøðin í tveimum pørtum varpar ljós á trupulleikan, at helvtin av teimum mongu, sum flyta til Danmarkar at lesa, ikki koma heim aftur.

Sendirøðin lýsir, hví føroyingar búseta seg uttanlands, og hvørjar avbjóðingar tað hevur fyri føroyska samfelagið.

Umframt sjálva røðina varð stórt arbeiði lagt í at breiða søguna út í aðrar sendingar og pallar í Kringvarpinum, eitt nú Dag og viku, Breddan, útvarpstíðindini og ein serstakan podd, sum fór aftur um tølini.

Elin Mirjamsdóttir og Jógvan Eli Dam gjørdu sendirøðina.

**Fólksins rødd**

Fólksins rødd er aftur í 2024-hami. Sendirøðin, sum var væl umtókt í sjónvarpinum i 00unum, er tikin av hillini og løgd í ein nútíðarham. Sendirøðin gevur innlit í ein part av gerandisdegnum hjá nøkrum útvaldum føroyingum, sum eisini siga sína hugsan um aktuell samfelagsevni.

Sendirøðin varð send í tveimum umførum – fýra partar á vári og fýra partar á heysti.

Alt dokumentartoymið í Kringvarpinum gjørdi sendirøðirnar.

**Komið øll við**

Søgan um føroyska orkestrið Straight Ahead og gávaða oddamannin Jørgin Dahl fortald í tveimum pørtum.

Tað eru nú liðin júst hálvthundrað ár, síðan Straight Ahead purraðu føroyingar út til eina nýggja tíð í føroyskum popp- og rokktónleiki.

Suni Merkistein og Hans Petur Hansen gjørdu sendirøðina.



### Heim, kæra heim

Í "Heim, kæra heim" eru vit kring landið og vitja í húsum, sum á ymiskan hátt eru áhugaverd. Húseigararnir greiða frá eitt nú húsinum, innbúgvi, litum og hví heimið bleiv júst soleiðis.

Tríggir partar vórðu gjørdir, og avgjørt varð at gera tríggjar afturat at senda í 2025.

Rannvá Fossáberg og Elin Dagbjartsdóttir gjørdu sendirøðina.

### Mett fyri minni

Nógv góð og bílig mathugskot liggja goymd kring landið.

Og nøkur av teimum verða lýst í matsendirøðini "Mett fyri minni", sum skal geva hyggjaranum íblástur at eta stuttflutt og burðardygt.

Sunniva Gudmundsdóttir Mortensen, Finnur Koba, Símun Waag og Jógvan Eli Dam løgdu sendingarnar til rættis.

### Sært tú fuglin?

Tróndur Olsen, Hallur Thomsen og Silas Olofson settu sær fyri at royna at fanga nakrar av mongu forvitnisligu flytufuglunum við kameralinsuni. Upptøkurnar gingu so mikið væl, at teir gjørdu tríggjar partar, sum vóru sendir á vári og tveir partar afturat á heysti.

Tróndur Olsen, Hallur Thomsen og Silas Olofsson gjørdu sendirøðirnar.

## Dokumentarsendingar

### Bass Elvis og Jesus á Mallorka

Jóannes Joensen livdi í fleiri ár tað góða lívið sunnanfyri sum undirhaldari. Men ein traumatisk hending á strondini steðgaði dreyminum hjá leirvíkinginum, sum noyddist heim aftur til Føroya.

Í sendingini fylgja vit Bass Elvis í Leirvík, har hann spakuliga roynir at fáa sangkarrieruna upp aftur á beint.

Brøðurnir Finnur Koba og Thomas Koba hava gjørt dokumentarin.

### Mítt lívsverk – eitt portrett av Pál Weihe

Síðani 1984 hevur Pál Weihe, professari, staðið á odda fyri at savna inn blóðroyndir í hundratúsundtali frá okkum føroyingum. Í sendingini fáa vit innlit í bæði gerandisdagin og privatlívið hjá Páli Weihe.

Barbara Samuelsen og Hans Petur Hansen gjørdu dokumentarin.

### Móti høgum tindum

Í sendingini fáa vit søguna um gongdina í føroyskum hondbólti hesi seinnu árini. Sagt verður frá arbeiðssetninginum hjá Hondbóltssambandinum, ið hevur strítt seg úr húsagangi upp á tindin. Vit fylgja manshondbóltslandsliðnum á leiðini til søguliga EM-endaspælið og eru við teimum á venjingarlegu í Føroyum og Íslandi í heyst.

Suni Merkistein og Hans Petur Hansen gjørdu dokumentarin.



### Hansina

Hansina Iversen er kend fyri sínar serligu formar og skap. Í sendingini fylgja vit myndlistakvinnuni í fyrireikingunum til eina framsýning í Keypmannahavn.

Elin Mirjamsdóttir og Jónfinn Stenberg gjørdu dokumentarin.

### Brotið – Livar málar lagnustund

26. august í ár holvdist Naddoddur av einum ógvusligum broti í Stadhavinum út fyri norsku strondini. Vit fylgjast heim úr Noregi við Livari Nysted og eru við, nú Livar brúkar pensilin sum amboð at seta orð á skelkandi hendingina.

Gestur Janusarson Lómsteni og John Johannessen gjørdu sendingina.



### Closed for Maintenance – á fimta sinni

Á vári 2023 var sjónvarpslið við og fylgdi einum bólki av fólkum úr nógvum ymsum londum, sum vóru við í átakinum “Closed for Maintenance”.

Tórður Mikkelsen og Jakob Jørgensen gjørdu sendingina.

## Smærri sendingar og røðir

### Hin rusuti á Aconcagua

Sendirøðin í tíggju pørtum lýsir ferðina hjá hinum rusuta upp á Aconcague, hægsta fjall í Amerika.

Jens Jákup Hansen gjørdi sendirøðina.

### Hvør býr her?

Hvat dámar føroyingum betur enn at gita, hvør býr hvar?

Í fýra pørtum verður farið á gátt við ymsum gestum at gita, hvør býr her.

Jákup Andrias Hansen og Rógvi Langgaard gjørdu sendirøðina.

### Foytar verkfalsgreyðir

Verkafólk eru farin í verkfall, og handlarnir eru at kalla tómir fyri feskum mati og grønmeti. Kári og Tróndur (og børnini) vísa, hvussu tú við einum sindri av hugflogi kanst fáa nógv burtur úr teimum vørum, sum sjáldan verða uppi.

Jónfinn Stenberg gjørdi sendingina.

### Við Gutta á fjalli

Heystfjøllini skulu gangast. Jens Jákup Hansen er farin á Ryggsvíkina saman við Gutta Guttesen, hagamanni.

Jens Jákup Hansen og Jónfinn Stenberg gjørdu sendingina.

### Fletta í Kongsstovu

Ein sending, har vit fylgja gongdini, meðan tey í Kongsstovu í Haraldssundi fletta seyð. Tey hava riggað seg til í kjallaranum á gamla handskavirkinum, har einir 300 seyðir, sum hava gingið fyri Innan og Uttan á Skarði, og fyri Sunnan í Haraldssundi, verða flettir.

Kári Sólstein gjørdi sendingina.



# Útvarp

Útvarpið hevur framvegis ein stóran leiklut í gerandisdegi føroyinga, og sambært nýggjastu lurtarakanningunum lurta føroyingar nógv eftir útvarpinum. Gerandismorgnar byrjar útvarpið at senda kl. 7 og sendir til klokkan umleið 22, síðani kemur náttarrásin. Útvarpsskráin er bygd upp við flatum, har sent verður dagliga við sendingum og røðum. Gerandisdagarnir hava rútmu, har dagarnir líkjast, meðan vikuskiftini líkjast burturfrá.

### Góðan morgun Føroyar

Hvønn gerandismorgun er Góðan morgun Føroyar er á skránni frá klokkan 7.35 til 9.50.

Evnisliga hevur sendingin stóra breidd og málbólkurin er framvegis breiður. Alt frá serfrøðingum, veðurforsøgnum, kappingum og søgum kring landið. Eisini hevur sendingin í størri mun havt beinleiðis tónleikaframleiðslur.

Fleiri nýggir tættir eru í sendingini veturin 2024. Nevnast kann m.a. Brot úr Føroya søgu, sum er samstarv við Fróðskaparsetur Føroya. Í táttinum verður sjóneykan sett á serstakan persón, hending, lut ella annað úr søgu okkara.

### Vikan

Vikan sá fyrstu ferð dagsins ljós á heysti 2023. Vikan, sum er beinleiðis sending leygarmorgnar, tekur pulsin á vikuni, sum fer. Sendingin setir aktuellar søgur, hendingar og rák í eitt annað ljós. Við kjaki, samrøðum og satiru geva vit føroyingum eina løtu til umhugsni við einum skeivum smíli.

Vertir eru Ingi Rasmussen og Lív Mikkelsen.

### Orðaval

Á heysti 2024 sá nýggj málsending dagsins ljós. Talan er um sendingina Orðaval, sum er sending, ið viðger føroyskt mál á ymsan hátt.

Skiftandi málkøn fólk gera sendingina saman við vertinum, Øssuri Egholm.

### Vágskálin

Vágskálin er sending við mentanarligum ummælum. Tveir ummælarar eru við hvørja ferð, og í flestu førum verða bøkur vigaðar á vágskálini. Ummælini verða gjørd sum samrøður í útvarpsstovuni, og brot verða spæld úr tí, sum ummælt verður. Á vágskálina kunnu eisini verða lagdir sjónleikir, framsýningar og framførslur. Serlig rák í tíðini verða viðhvørt vigað og viðgjørd.

Uni Arge leggur til rættis.

### Skrivað stendur

Tvær tekstarøðir eru í kirkjuni. Tann fyrra stavar heilt aftur til ár 500, og seinna er frá 1895. Har eru tekstir úr Nýggja Testmenti savnaðir, og teir fylgja kirkjuárinum, sum byrjar fyrsta sunnudag í advent. Hesir vísu aldargomlu tekstir er enn viðkomandi, men hvussu lesa vit teir, og hvussu skilja vit teir?

Í sendingini “Skrivað stendur” lesa vit tekstin og siga frá hugtøkum og øðrum, sum er tongt at honum. Gestir fara so at viðgera tekstin, og tað eru ymisk fólk, sum eru við hvørja ferð.



### Samværi

Tvey listafólk, Beinir Bergsson, yrkjari, og Dania O. Tausen, yrkjari og tónlistafólk, hitta hvørja viku tvey onnur listafólk og tosa um list.

Í hvørjum parti koma listafólk í prát við onnur, sum tey kanska annars ikki høvdu komið í samband við í listaheiminum. Listafólkini tosa um listina og viðurskiftini hjá hvørjum øðrum.

Sendingin hevur ikki nakað aktualitetsprinsipp galdandi fyri luttøku í sendingini, men heldur vilja vertirnir sjálvir seta ymiskt á breddan.

Dania og Beinir tosa á jøvnum føti við gestalistafólkini, og somuleiðis verða gestirnir bidnir um at seta seg inn í listina hvør hjá øðrum, soleiðis at samrøðan kann fara djypri inn í tilgongdir og smálutir.



## Røðir og stakar sendingar

Umframt størru flaturnar eru ein rúgva av røðum og støkum sendingum á skránni. Tær føstu og vælkendu sendingarnar eru m.a. Við Tórði á túri, Vikuskifti, Credo og Skratsj. Harafturat hava fleiri styttri og longri røðir verið á skránni í 2024.

### Tá Grønland bjargaði Føroyum, røð í 6 pørtum

Grønland hevur mangan roynst føroyingum væl, og í fleiri ár var meiri enn helvtin av føroyska útflutningsvirðinum fiskað í Grønlandi. Í seks útvarpssendingum viðgjørdu vit grønlandsútróðurin, ið er ein týðandi og forvitnisligur partur av føroyskari vinnulívssøgu.

Lagt til rættis: Gunnar Nolsøe.

### Horvni mykinesmaðurin

Í 1912 fer Jóan Frederik Joensen úr Mykinesi til Kanada. Fyrstu árini er brævasamband millum Jóan Frederik og familjuna heima í Føroyum. Men í 1920 slitnar alt samband við hann. "Horvni mykinesmaðurin" er ein dokumentarisk ljóðmynd um Jóan Frederik Joensen úr Mykinesi. Hvør var hann, og hvussu var ein gyllin í jørð við til at loysa gátuna um hansara lagnu?

Magni Arge legði sendingina til rættis og byggir m.a. á grein hjá Zacharias Wang.

### Føtur undir egið borð

Í trimum partum verður hugt nærri eftir bústaðarviðurskiftunum hjá føroyingum. Hví er tað so dýrt at búgva í Føroyum? Passar tað, at øll vilja eiga egin sethús? Hvussu vilja vit búgva í framtíðini, og er pláss fyri okkum øllum?

Elin Michelsen legði til rættis.

### Elians Sonur

Elians Sonur er ein røð í fimm pørtum. Ragnar W. Eliansson (1993) tosar úr tilveruligum og politiskum sjónarhorni.

Høgni Mohr, rithøvundur, legði til rættis.

### So sita vit í Fornanum

Útvarpsrøð í fýra pørtum, sum Høgni Mohr hevur lagt til rættis. Sendingarnar snúgva seg um tilveruna hjá Jakobinu Ellingsgaard (1958). Jakobina býr í Sørvági. Upptøkurnar eru gjørdar heima hjá henni og í Havn.

## Annað

Eins og sjónvarpið er útvarpið eisini til staðar til serligar høgtíðsdagar. Bæði jól, páskir og ólavsøka eru háárstíð hjá útvarpinum – og við tónleiki, konsertum og sendingum annars ríkar útvarpið okkum høgtíðirnar.

Á ólavsøku, nýggjársaftan, jólaaftan og aðrar høgtíðsdagar er útvarpið altíð til staðar við beinleiðis frásagnum og innsløgum.



# Átrúnaður



# Meira enn 300 tímar við átrúnaði

Kringvarpið framleiðir nógv átrúnaðarligt tilfar til bæði sjónvarpið og útvarpið. Í 2024 kom tímatalið upp á 330 tímar. Í útvarpinum sendu vit 260 tímar og 70 tímar í sjónvarpinum.

Í 2024 var átrúnaðarliga økið dagført eitt sindur. Nýggjur andaktsleistur varð skipaður, har Armgarð Arge vitjar heima á prestagørðunum og prátar við prestin á staðnum. Eisini er nýtt samstarv gjørt við ymsar samkomur um at framleiða lidnar andaktir fyri Kringvarpið at senda.

### Hetta heilaga evangeliið skrivar

Sendingin verður send hvørt leygarkvøld kl. 17.45 og endursend sunnumorgun kl. 8.45. Ymsir prestar skriva til eitt kirkjuár í senn. Eitt kirkjuár byrjar og endar fyrsta sunnudag í advent. Í ár skrivar Lis Samuelsen, prestur.

### Møti í útvarpinum

Seks ferðir um árið senda vit evangelisk møti hjá Brøðrasamkomuni. Vanliga verða tey send sunnudag kl. 17. Vit fáa tey sum lidna framleiðslu at senda.

### Ferðaliðið

Ferðaliðið er toymið, sum tekur møti og gudstænastur upp hvønn sunnudag at verða send í sjónvarpinum. Síðani koronudagarnar hava vit hvønn sunnumorgun tekstað alla gudstænastuna og ofta eisini prædikuna hjá presti. Vit teksta sang/sálmar hjá fríkirkjunum.

### Gudstænastur í útvarpinum

Vit royna at senda gudstænastur kring alt landið, har tað ber til. Í útvarpinum og sjónvarpinum senda vit somu gudstænastu beinleiðis.

Allahalgannaaftan senda vit gudstænastu úr Dómkirkjuni beinleiðis í útvarpinum. Eisini senda vit, annan hvítusunnudag, uttandura gudstænastuna av ovara vølli í Gundadali í Havn. Triðja páskadag taka vit upp til sjónvarpið ta felags kirkjuligu gudstænastuna.





### Nýggjársgudstænastan

Gudstænastan nýggjársaftan og nýggjársdag var í Kirkjubøar kirkju, har Steintóra Gleðisheygg, prestur, prædikaði. Havnakórið, undir leiðslu av Leif Hansen, sang pre- og postludium. Maria Ronnisdóttir á Heygum sang "Happy Xmas", og Ronny Nielsen spældi gittara. Jóannes Patursson las úr Prædikaranum.

### Gudstænastur og møti

Møtini og gudstænastur eru úr katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuliga Heimamissiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum og Heimamissióni.

### Andaktir í sjónvarpinum: Ymisk og tó

Vit hava roynt nýggjan andaktsleist. Vit eru farin út í prestagarðarnar og hava tosað við prestin á staðnum og eisini filmað kirkjuna og inni í vøkru, aldagomlu prestagørðunum. Hesar andaktir hava vit nevnt "Ymisk og tó".

Sum eina roynd at nýhugsa hava vit spurt Heimamissiónina, Brøðrasamkomuna og Kelduna, um tey kunnu gera nakrar andaktir til okkum at senda. Tey vóru jalig, og væntandi fara vit at senda hesar í 2025.

### Credo

Credo er sending, har ljós verður varpað á lív og menniskju, teg og meg, etikk, filosofi og moral, kirkjur og samkomur, átrúnað her og úti, og prát við menniskju. Vertur er Armgarð Arge.

### Skrivað stendur

Nýggja sendingin Skrivað stendur verður send hósdag kl. 17 og endursend sunnumorgun kl. 10.05. Kári Sólstein og Armgarð Arge eru vertir í sendingini. Tey umrøða sunnudagsins prædikutekst, og lætt hevur verið at fáa fólk í útvarpsstovuna at práta um aldagomlu bíbliutekstirnar, sum tó eru dagsaktuellir. Vit hava lagt dent á at finna fólk, sum vit kenna úr almenna rúminum.




# Børn og ungdómur

# Heimasíðan er á tremur við føroyskum og føroyskt mæltum tilfari til børn og ung

Tilfar til børn og ung hevur høga raðfesting, og stórur dentur verður lagdur á at menna økið og framleiða nýtt føroyskt tilfar. Hetta er alneyðugt í eini tíð, har ein vaksandi nøgd av útlendskum tilfari er tøk hjá yngstu ættarliðunum.

Nógv føroyskt tilfar varð framleitt í 2024, og eisini vórðu útlendskar røðir keyptar, sum skulu týðast og ljóðsetast í 2025. Eitt nú kundu børnini gleða seg til, at góða gamla Mumi-røðin frá 1990unum gjørdist tøk í VIT-appini og á kvf.fo.

Niðanfyri eru nakrar av framleiðslunum í 2024 lýstar.





## Børn

### Labbaliðið

Vit bíðaðu spent eftir væl kendu hvølpunum, sum eru at síggja allastaðni – á ballónum á ólavsøku, á blusum og á leikum. Tað hevur verið sera spennandi og stuttligt at arbeiða við Labbaliðnum – ein av-bjóðandi uppgáva, men sum Reidar plagar at siga – eingin uppgáva ov stór, eingin hvølpur ov lítil. Tað hevur stóran týdning, at væl kendu røðirnar sum Paw Patrol eru á føroyskum, og tí fegnast vit um, at Labbaliðið kom á VIT-appina saman við øllum hinum góða føroyska tilfarinum. Hvølparnir í Paw Patrol tosa føroyskt, og teir hava fingið føroysk nøvn og eita nú Djarvi, Brandur, Flog, Kneysi, Tóti og Streymur – Reidar er liðskipari, og Paw Patrol eitur nú Labbaliðið.

Børn og vaksin gleddu seg at síggja fyrstu partarnar av Labbaliðnum. Her eru seks raskir hvølpar, sum altíð eru til reiðar at bjarga degnum. Tað er dugnaligi liðskiparin Reidar, sum býtir uppgávurnar út, og Djarvi, Brandur, Flog, Kneysi, Tóti og Streymur fara fús til verka. Øll duga okkurt serliga væl og hava hvør sítt far at loysa fløkjurnar í Ævintýravík við. Labbaliðið lærir okkum, hvussu umráðandi tað er, at øll arbeiða saman og hjálpa hvørjum øðrum. Røðin er full av gleði, samstarvi og góðum ævintýrum.

### Við Klintrimús í biograf

Fyri fyrstu ferð nakrantíð var ein barna- og familju-teknifilmur vístur í biografinum á føroyskum. 11. oktober var ein søguligur dagur, tá ið fyrsta sýning var í Havnar Bio. Í samstarvi við Havnar Bio vísti Kringvarpið væl kendu søguna hjá Thorbjørn Egner um Klintrimús og hini dýrini í Vallbakkaskóginum.

Børn og vaksin fóru saman at hyggja og uppliva nýinnspælda teknifilmin um Dýrini í Vallbakka-skóginum við føroyskari talu. Søgan, sum er skrivað fyrst í fimmtiárunum, hóskar sera væl til dagsins samfelag við teimum avbjóðingum, sum vit øll noyðast at taka støðu til. Eitt nú at eta grønt og at hugsa øðrvísi. Og við vón um eitt rættvísari sam-felag, har øll kunnu liva við hvørjum øðrum og ikki av hvørjum øðrum. Vit gleddust at síggja hesa kendu søguna á filmi, sum vit annars kenna so væl frá bókini og sum útvarpsleik.

### Vinus og Vimús

10 nýggir Vinus og Vimús partar vóru tiknir upp og vóru at síggja í sjónvarpinum og sjálvandi eisini í VIT-appini og á heimasíðuni hjá KVF. Vinus og Vimús barnarøðin er til børn í aldrinum 2-6 ár. Sendirøðin leggur seg eftir at menna málið hjá teimum yngstu. Vinus er ein fittur vinur, ið dugir væl at finna upp á spøl, spæla tónleik og siga søgur.

## Angela og Hannibal

Nú hava Angela og Hannibal gjørt barnasendingar í 25 ár. Og tað skuldi hátíðarhaldast. Í fýra pørtum verða vit undirhildin við spennandi og stuttligum sjónvarpssendingum. Tað er ein serstøk hending, at ein mynd verður málað, sum hevur virði á 12 milliónir krónur. Í fyrsta parti av Angelu og Hannibal eru vit vitni til hesa serligu hending, og tað er eingin annar enn kendi føroyingurin Livar í Hvannasundi, sum málar. Í sendingini er tað sjálvandi onkur, ið vil hava fatur á málninginum, og tað verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer fram. Eisini vitjar Angela Elianu í Kunoy, og vit síggja nøkur forkunnug djór, sum Eliana vísir fram. Angela vitjar børnini, og tey fara ein hugnaligan túr í føroysku náttúruni. Eitt er heilt víst, og tað er, at Ib Ullrik ikki er nakar dummur hundur, og tí hevur hann sjálvandi eina ætlan um, hvussu hann kann fáa fatur á málninginum, sum tey skulu vísa fram til 25 ára dagin.

## Sløkki-Sam, Fílur og djórini, Fílur og maskinurnar, Snipp Snapp

Fleiri nýggir partar av væl kendum røðum vóru framleiddir í 2024. Sløkki-Sam er ein djarvur sløkkiliðsmaður, sum saman við hinum sløkkiliðsmonnunum í Puntabø bjarga teimum, sum koma í vanda.

Eisini var Fílurin væl móttikin – Fílur og maskinurnar, har Fílur hyggur at ymsum maskinum, og Fílur og djórini, har ið Fílur heilsar upp á ymisk djór.

Snipp Snapp var tikið upp í Atlantis í Klaksvík. Børn í grunddeild á Skúlatrøð vóru vertir.

## Miks

Á kvf.fo var nýggj síðu løgd afturat barna- og ungdómsøkinum. Talan var um spildurnýggju síðuna Miks, sum er ætlað børnum í aldrinum 9-14 ár. Inni á MiKS eru nýframleiddar sendingar til málbólkin, men eisini eldri sendingar úr VIT, sum hóska væl til henda málbók. Fyrsta sendingin til MiKS bar heitið Parkour við Markusi. Vertur í sendingini er Markus Precious Køtlum, sum hevur drúgvar royndir í parkour. Í 9 pørtum lærir Markus ymisk útvald parkourtriks frá sær, og síðani vísir hann triksini ymsastaðni í Føroyum. Við fangandi tónleiki, feitum umhvørvi og dugnaligum verti vekir sendingin hugin til at royna snarlop, konglop ella kanska eitt veggjarenn, tí sum Markus sigur: Parkour kann íðkast allastaðni, og øll kunnu vera við!

Brævkassin var onnur røð í Miks. Í Brævkassanum svara kendir føroyingar og føroyingar, sum hava kend størv, spurningum frá børnum.

## Barnaútvarpið

Í barnaútvarpinum hoyra vit útvarpsleikir, søgur og ljóðmyndir. Børnini koma til orðanna og siga sína hugsan um frítíðarítriv, áhugamál og onnur samfelagslig evni. Vit ferðast kring landið, so øll koma til orðanna – børn í øllum aldri, gentur og dreingir.

## Fiktión í barnaútvarpinum

Vit løgdu fyri við góðari upprunaføroyskari fiktión við ársbyrjan. Talan er um bókina 'Toran gongur', sum Rakel Helsmdal hevur skrivað. Bókin er ein hjartanemandi søga, har ymiskt ótrúligt, sum eingin kundi ímyndað sær, veruliga hendir. Her er eitt hús, fýra húski og ein hending, sum broytir alt. Øll í húsinum hava sár á sálini. Pápin Marinus og børnini Aurora og Kaspian sakna mammuna, sum fór frá teimum. Enara og dóttirin Sirje noyddust at rýma undan krígnum. Sorg og einsemi hava tikið allar litir úr verðini hjá unga Viktori. Gamli klaverleikarin madam Iris hevur mist tónleikin í sínum lívi. Ein dagin bjóðar fjúrtan ára gamla Aurora øllum í tí stóra, gamla húsinum til døgurða, og tey taka eitt trilvandi fet inn í lívið hjá hvørjum øðrum.




## Flýggjanin til bakgøturnar

Vit hoyrdu ljóðmyndina 'Flýggjanin til bakgøturnar', sum er fjórða bókin í røðini um agentin Elvin Griff. Arne Svingen hevur skrivað, og Hildigunn Niclasen týddi til føroyskt. Bókadeild Føroya Lærarafelags gav út í 2023. Elvin Griff flýggjar saman við Lýdiu. Tey koma til ein bý, har karneval er, og grýluklæddir agentar eru eftir teimum. Men hvør er gentan, sum vísir seg í fólkamongdini, og biður tey koma við sær? Elvin og Lýdia noyðast at berjast ímóti vandamiklum fíggindum.

## Klintrimús og hini dýrini í Vallbakkaskóginum sum útvarpsleikur

Í sambandi við, at Klintrimús og hini dýrini í Vallbakkaskóginum var sýndur í biografinum, valdu vit at fara í savnið eftir vælkenda útvarpsleikinum og endursenda søguna í barnaútvarpinum. Soleiðis lurtaðu børn og vaksin saman eftir klassisku søguni hjá Thorbjørn Egner, og her var sungið og lurtað.

### Mórugøta og Falligokkurin

Nú hava vit lagt allar partarnar um tey í Mórugøtu út á KVF/VIT/ljóð. Nú er lætt at finna útvarpsleikin, og her verður dúgliga lurtað. Í alt eru 16 røðir um tey í Mórugøtu. Nýggjasta røðin eitur 'Mórugøta og Falligokkurin', hon var at hoyra í november 2024. Vit hoyra um Kenneth, Katju, mammuna og pápan, sum búgva í Mórugøtu 8. Og so sjálvandi hoyra vit eisini Jón, vinmannin hjá Kenneth og um vikarin í skúlanum. Jákup Veyhe skrivar og leggur til rættis.

### Páll fangi og Jesu líðingarsøga

Vit hoyrdu siðsøguligar og átrúnaðarligar ljóðmyndir. Í tólv pørtum hoyrdu vit um Páll Fanga. Tá ið pápi Páll doyr, verður Páll lagdur undir at hava beint fyri honum við eitri, og tí flýggjar og krógvar hann seg í fjøllunum í Kalsoynni. Men Páll sleppur ikki so, men verður tikin og settur í Skansan. Oddvør Johansen skrivaði um Páll fanga, og høvundurin gevur søgnini ein nýggjan, øðrvísi enda.

Jesu líðingarsøga eftir Frits Johannesen var at hoyra í barnaútvarpinum á páskum.

### Temasendingar

2024 var eitt hendingaríkt hondbóltsár. Vit valdu at varpa ljós á føroyska hondbóltslandsliðið hjá monnum, tá ið EM í hondbólti var í Berlin. Vit vóru við, tá ið teir vandu, tá ið teir ferðaðust runt skúlar, og børnini settu teimum spurningar.

Væl kendir tónleikarar greiddu frá í barnaútvarpinum í Spæl føroyskt-vikuni, eitt nú Eyðfinn Lamhauge úr Aggrasoppum. Eisini hoyrdu vit fleiri sangupptøkur, tá ið børnini sungu kring landið.

Nógv var gjørt burtur úr 'Føroyar lesa' í sambandi við rithøvundavitjanir. Tað var áhugavert at hoyra føroyskar rithøvundar greiða frá og hoyra, hvussu spent børnini eru, tá ið tey fáa vitjan, og at tey sleppa at spyrja um bøkur, tey hava lisið. Vit vitjaðu bókasavnið við Streymin, sum vann ársins lesiátak 2024.

Tá ið vetrarskráin byrjaði, vóru føroyskar tónleikastjørnur í barnaútvarpinum; Eivør, Jens Marni, Guðrið, Marius DC og Beinir. Felags fyri hesi er, at tey hava øll sungið ymsum sendingum í Kringvarpinum, tá ið tey vóru børn. Vit sóu og hoyrdu brot úr hesum sendingum, og áhugavert var at hoyra, tá ið tey sóu og hoyrdu brotini aftur, og tá tey greiddu frá, hvussu tónleikalívið byrjaði.

"Hetta er besta tíðin á árinum", sigur 10 ára gamli Nóa úr Funningsfirði, sum dámar væl at fara eftir havhestum við bátinum Snipp. Hann stýrir mangan bátinum út eftir firðinum. Tá ið teir eru komnir út í Djúpini, so er hann til reiðar við glúpinum og er kvikur og fær fleiri havhestaungar, sum hann kippir og roytir. Tann eina dagin fingu teir 100 havhestaungar, og einsamallur fekk Nóa 17 havhestaungar. Vit vóru við eftir havhestaungum. Og Nóa hevði úr at gera.

Vit hava ferðast kring landið við barnaútvarpsmikrofonini. Í Suðuroy høvdu børnini nógv upp á hjarta, og í sjey sendingum greiddu tey frá seyðahaldi, Fit First, tey sungu og spældu ljóðføri og mangt annað. Á Sandoyar meginskúla hoyrdu vit um áhugavert evnisarbeiði í sambandi við, at Sandoyartunnilin læt upp. Vit vóru við á kvæðastevnu í Norðurlandahúsinum, tá ið næmingar úr øllum Føroyum kvóðu. Tá ið nýggjur barnatónleikur var framleiddur, vóru vit við, eitt nú, tá ið Ha Ha-oyggin kom út.





## Ungdómurin

### Kvøldvaktin

Kvøldvaktin var á skrá hvørt sunnukvøld.

Tað er Svend Danielsen, sum í nakrar tímar sunnukvøld tekur ímóti sangynskjum frá lurtaranum.

### Praktikantarnir

Praktikantarnir var beinleiðis ungdómsútvarp við tónleiki og práti, sum var á skrá sunnukvøld.

Silja á Rógvi og Hansina Ólavsdóttir Hansen vóru vertir.

### Sex partar

Sendirøð í 6 pørtum, sum varð send sunnukvøld í januar. Í sendingini spyrja tveir nýútbúnir seksual-undirvísarar sexologin um alt frekt og flóvisligt.

Andrea Arnfríðardóttir og Paul Kjartan Matras leggja til rættis.

### Eg eri tvørkynd/-ur

Eg eri tvørkynd/-ur var sendirøð í tveimum pørtum, har tosað var við fólk, sum eru komin út sum tvørkynd.

Anna Joensen-Næs legði til rættis.

### Súrligar nætur

Súrligar nætur er útvarpssending, har trý ung tosa um tað, sum rørir seg í Føroyum og Danmark. Tey viðgera evni, sum ung tosa um sínámillum, viðgera ymiskt, tey hava sæð á netinum, og so halda tey seg ikki aftur við at prika til hvønn annan og onnur.

Bárður Petersen, David Thomassen og Rannvør F. Eyðunsdóttir leggja til rættis

### Sement

Eins og undanfarin ár sendu vit frá Sement-tónleika-kappingini á Reinsarínum í 2024. Tað vóru ung fríyrkisfólk, sum stóðu fyri framleiðsluni, og tað bleiv sent frá bæði innleiðandi umførunum og finaluni.

# Tónleikur



# Føroyski tónleikurin nærkast tveimum triðingum

Sambært uppgerð frá sendiskipanini spældi útvarpið 78.135 sangir í 2024 – slakar túsund sangir fleiri enn árið fyri. Av hesum vóru 49.819 føroyskir. Tað merkir, at sløk 64% av tónleikinum í útvarpinum í 2024 var føroyskur.



### Spæl føroyskt-vika

Spæl føroyskt-vika var frá 3. til 10. mars, og tá varð einans føroyskur tónleikur spældur í øllum frum-sendingum, á náttarrásini og rundan um sendingar annars í útvarpinum.

Vikan byrjaði við eini setan í Gulu smiðju í Saltangará við framførslum og røðum.

### Ársins útvarpshitt

Ársins útvarpshitt varð valt av lurtarunum hjá Kring-varpinum í Spæl føroyskt-vikuni. Atkvøðugreiðslan gekk fyri seg á kvf.fo. Lurtararnir valdu sangin “Tá eg sá teg” hjá Árna Andreasen at vera Ársins útvarps-hitt í farna árinum 2023.

### Faroese Music Awards

FMA – árliga gallatiltakið, har føroyskur tónleikur verður fagnaður – varð hildið 9. mars í Norðurlanda-húsinum og sent beinleiðis í sjónvarpinum.

Tónleikasamband Føroya skipar fyri tiltakinum. Kringvarpið og Norðurlandahúsið eru samstarvs-felagar.

Tólv virðislønir vórðu latnar umframt seks framførslur.

Hanus G. Johansen fekk ársins tónleikaheiður.

### Saksofonkonsert í Norðurlandahúsinum

Kringvarpið upptók í apríl debutkonsertina hjá saksofonistinum Kristinu Thede Johansen. Fimm nýggj føroysk tónlistaverk vórðu framførd saman við einum úrvali av Føroya fremstu tónleikarum. Konsertin varð send í desember.

### World New Music Days

World New Music Days (WNMD) er ein árligur festivalur við samtíðartónleiki úr øllum heiminum. Í samstarvi við Felagið føroysk tónaskøld var festival-urin hildin í Føroyum í ár. Festivalurin varð skipaður við eini rúgvu av konsertum kring alt landið, og Kringvarpið tók upp fleiri av hesum konsertunum. Tær verða ætlandi sendar á summri 2025.





### Fleiri jólakonsertir

Sum vant vórðu fleiri konsertir sendar um jólini – bæði upptøkur, sum Kringvarpið hevði gjørt, og framleiðslur gjørdar uttan fyri húsið. Vit sendu árligu jólakonsertina í Ebenezer í miðbýnum í Havn, har Ebenezerkórið og gentukórið Aloe sungu saman við solistum.

Árliga jólakonsertin í Runavík, Jól við Løkin, varð send í tveimum pørtum.

### Knútsfagnaður

Tónaskaldið Knút Olsen varð fagnað við konsertum um alt landið í oktober. Fagnaðarkonsertin í Vágs kirkju bleiv upptikin og send á jólum. Tann stóri endabresturin – konsertin í Vesturkirkjuni – varð eisini upptikin og sett á skrá á páskum 2025.

### Nýggjárskonsertin

Kringvarpið sendi nýggjárskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri í Norðurlandahúsinum beinleiðis í sjónvarpinum.

Á konsertini við Føroya Symfoniorkestri og kóri luttóku italski tenourin Ivan Magrí og evnaríki violinleikarin Andrias Blaasvær.

### Vikuligu tónleikasendingarnar í útvarpinum í 2024

Vikuligu tónleikasendingarnar í útvarpinum eru smalar, men okkurt er fyri øll – poppur, klassiskur tónleikur, jazz, andaligur tónleikur, tónleikaummæli, nýggjur og gamal tónleikur, kvæði, rokkur, dansibandstónleikur o.m.a.

Harumframt vóru eisini aðrar stakar tónleikasendingar gjørdar í sambandi við høgtíðir og merkisdagar.

Tónleikasamskipari: Eyðfinn Jensen

# Public service



# Í fólksins tænastu

Kringvarp Føroya hevur skyldu til at útvarpa sendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald.

# Public service

Public service sipar til at vera í “fólksins tænastu”. Kringvarp Føroya og Mentamálaráðið hava sáttmála sínámillum – public service-sáttmála – og endamálið við honum er at lýsa, hvussu Kringvarp Føroya tænir Føroya fólki. Public service-sáttmálin er karmurin um virksemið hjá Kringvarpi Føroya og skal lýsa kjarnuuppgávurnar. Sáttmálin tryggjar sostatt armslongdina millum politisku skipanina øðrumegin og redaktionellar avgerðir og miðlafakliga arbeiðið hjá Kringvarpi Føroya hinumegin.

**Nýggjur public service-sáttmáli millum Almanna- og mentamálaráðið og Kringvarpið**

Í mai 2024 varð nýggjur public service-sáttmáli gjørdur millum Kringvarp Føroya og Almanna- og mentamálaráðið. Sáttmálin er galdandi frá 1. juni 2024 til 31. mai 2028 og skal tryggja, at Kringvarpið framhaldandi kann virka sum ein óheftur, savnandi og fólkaræðisligur miðil í einum broyttum miðla-landslagi.

Kringvarpsstýrið og -leiðslan hava sett sær fyri, at 4 av 5 føroyingar dagliga skulu brúka miðlarnar hjá stovninum. Hetta krevur styrkt infrakervi, nýggjar framleiðsluætlanir og miðvísa førleikamenning av starvsfólkunum. Arbeiðið at gera nýggja arbeiðs-ætlan fyri Kringvarpið varð byrjað í 2024.

Kringvarp Føroya kann tó ikki einsamalt verja fólkaræði og mentan. Kringvarpið er ein framleiðslu-stovnur og er ikki einsamallur førur fyri at menna miðlavanar, talgildar førleikar og keldukritiskar førleikar millum okkara fólk. Tí má politiska skipanin eisini undir eina tilgongd, har ymisk øki í samfelag-num, serliga útbúgvingarøkið, eisini gera sítt til at verja føroyska fólkaræðið og mentanina.

Les sáttmálan her.

**Samskifti við borgaran**

Kringvarpið leggur seg eftir at skipa fyri upplýsing um public service og fólkaræði í breiðum týdningi. Vit virka í fólksins tænastu, og tí tryggja vit støðugt samskifti við borgaran um alt landið.

Orðaskifti er við jøvnum millumbilum um public service, innihald, endamál og miðlapolitikk.
Talan kann vera um fund, ráðstevnu og almennar frágreiðingar um einstøku partarnar av public service-arbeiðinum. Í oktober í 2024 var stór miðlaráðstevna, ‘Uppmerksemi – bardagin um tína tíð’, hildin í Norðurlandahúsinum. Ráðstevnan setti sjóneykuna á, hvørjir avbjóðingar standast av nýggjum miðlavanum, og hvussu vit kunnu tryggja, at siðmenning, álit og dygd verða varðveitt. Hvussu kunnu vit sum borgarar, foreldur og miðlar sameinast um at styrkja fólkaræðið og varðveita grundleggjandi rættindi hóast broytingarnar? Sí framløgurnar frá ráðstevnuni á kvf.fo/umkvf.

Fesk tíðindi og blogginnlegg um stovnin, public service og programmvirksemi verða javnan kunn-gjørd á kvf.fo.

**Alnetstænastur og sosialir miðlar**

Eitt av málunum hjá Kringvarpinum er at røkka før-oyinginum, har hann er. Kringvarpið hevur í nógv ár verið til staðar á sosialu miðlunum við tilfari, sum vísir til og skapar áhuga fyri sendingum á netinum, útvarpinum og sjónvarpinum. Kringvarpið virðir leið-reglurnar um góðan fjølmiðlasið á sosialu miðlunum á sama hátt sum á hinum miðlapallunum.

Heimasíðan hjá Kringvarpinum verður støðugt ment sum samskiftis- og tænastumiðil, soleiðis at hon kennist viðkomandi og týdningarmikil fyri føroyingar í øllum aldri. Heimasíðan fevnir um tíðindi og aktuelt, mentan, tilfar til børn og ung, undirvísing og annað viðkomandi.

### Týtt, útlendskt tilfar

Kringvarpið leggur seg eftir at týða so nógv barnatilfar sum gjørligt. Tað er umráðandi, at føroysk børn hava atgongd til útlendskar teknirøðir, sum eru týddir til móðurmálið, eitt nú “Grísa Peppa”, “Mumi” og “Sløkki-Sam”.

Sum public service-stovnur hevur Kringvarpið somuleiðis skyldu til at gera føroyskt barnatilfar lættari atkomuligt, og nú er eisini ein meira tíðarhóskandi pallur til børnini, nevniliga VIT-appin.

### Tænastur til fólk, ið bera brek

Kringvarpið teknmálstulkar í samstarvi við viðkomandi partar tíðindi og sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga, beinanvegin. Kringvarp Føroya samskiftir og samstarvar við deyvaumhvørvið, so at játtanin til teknmálstulking verður brúkt á skilabesta hátt. Í hesum sambandinum er studio til teknmálstulking gjørt í Kringvarpinum.

Tíðindasendingar og gudstænastur í sjónvarpinum verða tekstaðar. Sendingar, ið hava stóran samfelagsáhuga og -týdning, eitt nú valsendingar og viðkomandi dokumentarsendingar, verða tekstaðar skjótast gjørligt. Kringvarpið sendir beinleiðis tekstfrásøgn frá tíðindafundum, sum snúgva seg um tilbúgving.

Teknmálstulkaðar sendingar eru at finna á KVF Sjón.

### Partur av tilbúgvingini

Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnumrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har tørvur er á tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið eftir eina lítla løtu kann varpa út, um eitthvørt álvarsamt hendir.

Nógv dømi eru um týdningin av greiðum almennum samskifti í sambandi við neyðstøður. Kringvarpið hevur havt aktivan leiklut í slíkum hendingum. Seinastu árini kunnu nevnast eldsbrunin á Varðanum Pelagic í 2017 og skriðulopini í Klaksvík í 2022. Eitt meira um fatandi dømi er koronukreppan, sum í Føroyum vardi frá mars 2020 til februar 2022, og har Kringvarpið var dúgliga nýtt í almenna tilbúgvingarsamskiftinum.

Hóast Kringvarpið hevur ein eyðsýndan leiklut í tilbúgvingini, er ætlanin at gera eina greiða mannagongd saman við hinum pørtunum í tilbúgvingini um skyldurnar hjá Kringvarpinum í hesum sambandi. Hetta arbeiðið var byrjað í 2024.



KRINGVARP
FØROYA